MONSTER TRUCK




Sosialurin

HPI SAVAGE 25

**Hettar er tann ultimativi monster truck bilurin**

- hann er 52cm langur og 42cm breiður
- 8stk. stoytdoyvarar & fjarðar sum kunna flyta seg uml. 20cm.
- Bilurin er 4x4 v/2-skift automatgear, og kann fáðast við bakgear, sum kostar eyka.
- Húsin er lakeraður og bilurin er samlaður.
- Topferð uml. 60-70 km/t.
- Fyri at bilurin skal verða koyriklárur skal tú brúka; 12stk.AA-Battarí til fjarðstyring, battarí 7.2V, gløðistart og brennievni.

Prísurin er við fjarðstýring kr. **4.995,-**

**Ring á Tlf. 522068 ella 322068**



Føroya Blindastovnur

## Skeið í tøving

Mánadagin 10. og mikudagin 12. mai verður skeið í tøving fyri blind og sjónveik.

Undirvíst verður frá kl. 13.00–16.30.

Vinarliga vendið tykkum til okkara í seinasta lagi hósdagin 6. mai kl.16.00.

**Føroya Blindastovnur**
**Tlf. 31 81 23 ella 31 82 22**


## Almannastovan

## Kunngerð

### um hægstu dagpeningaupphædd

Við heimild í §9, stk. 2 í »Løgtingslóg nr. 74 frá 8. mai 2001 um dagpening vegna sjúku v.m.« (dagpeningalógin), ger Almannastovan kunnugt:

§ 1.
Hægsta dagpeningaupphædd er ásett til kr. 3.613 kr. um vikuna íroknað frítíðarløn.

§ 2.
Henda kunngerð fær gildi frá 1. mai 2004.

**Almannastovan**
**hin 4 . mai 2004**

# Føroyskar fyritøkur við í oljuvinnuni

**-Tað hevur stóran týdning, at vit varðveita krøvini til kaikant í sambandi við komandi leiting. Føroyskar fyritøkur eiga at hava møguleika at vera við í menningini segði Hendrik Old, tingmaður m.a. undir 1. viðgerð av 2. Útbjóðing til oljuleiting á tingi herfyri**

2. ÚTBJÓÐING
*Jan Müller*



*Kai Leo Johannessen tók undir við uppskotinum frá landsstýrinum*



*Hendrik Old, tingmaður var fegin um nýggja uppskotið til 2. Útbjóðing*

Tingmenn tóku sum heild undir við uppskotinum frá landsstýrinum um eina nýggja útbjóðing á landgrunninum at leita eftir olju og gassi. Orðaskiftið var rættiliga drúgvt og verður uppskotið nú viðgjørt í Vinnunevndini. Vit hava hugt nærri at orðaskiftinum.

Framsøgumaður sambandsfloksins, Kai Leo Johannesen helt fyri, at 1. útbjóðingin hevði verið væleydnað, hóast einki rakstrarverdugt fund er gjørt. Hann rósti fólkunum, sum hava staðið fyri arbeiðinum. Hann helt, at man við treytunum fyri 2. rundu hevur tikið væl atlit til, at føroyska samfelagið fær inntøkur burtur úr eini oljuvinnu og vísti til tað skilagóða í at hav eitt royalty uppá 2%, síðani vanliga kolvetnisinntøkuskattin uppá 28,5% og so alt eftir inntøku man fær frá einum oljufundi, har ein serskattur verður lagdur omaná í trimum stigum.

Hann helt eisini, at vit longu hava fingið nakað burtur úr, nevniliga eina ávísa vitan, hvussu man tilrættaleggur framyvir og at føroyingar á jøvnum føti við útlendingar skulu vera við til at veita tænastur í sambandi við oljuleiting. Hann vísti tó á, at tað í praksis kann vera eitt sindur verri, tí tá kunnu feløgini velja tað, sum tey meta vera best egnað. Men sum man hevur skilt hevur tað verið ein positivur andi at loyva føroyskum fyritøkum uppí.

Kai Leo helt uppskotið til 2. rundu verða væl úr hondum greitt. Hann vísti til, at man hevur tikið hædd fyri fiskivinnuni eisini í hesum og helt hann fyri, at tað eru ikki nógv mótmæli frá vinnuni móti útbjóðingini, tí ahon skal ganga út yvir aðrar vinnur. –Vit kunnu staðfesta, at Atlantsflog hevur fingið ein sáttmála í útlendsku oljuvinnuni, og tað mugu vit fegnast um. Vit vóna, at tað kemur at spyrjast nakað burtur úr, og hetta uppskotið hevur sum ein positiv broyting nakað við inntøkur at gera.

### Meira varin

Hendrik Old, framsøgumaður Javnaðarfloksin helt fyri, at umstøðurnar rundan um annað útbjóðingarumfar eru meira dempaðar enn kring fyrsta umfarið. Rokanin við fyrsta umfar í tinginum var nógv, og vónirnar vóru sera høgar, um, at oljan fór at geva nógvar pengar skjótt. –Men tað má sigast til rós fyri fyrrverandi landsstýismannin, Eyðun Elttør, at hann royndi at dempa vónirnar og mælti til tolsemi. Ætlanin við 2. rundu er at skapa grundarlag og áhuga fyri framhaldandi leitivirksemi, og at føroyskar fyritøkur verða tryggjaðar møguleikar at kappast við aðrar. Hetta halda vit vera umráðandi og gott at hava við, nevniliga at loyvishavarin skal arbeiða fyri, at avtalur verða gjørdar millum føroyskar og útlendskar fyritøkur og stovnar, sum kunnu leggja upp til føroyska kunnleika og tøkniligan kunnleika.

Hendrik Old, sum eisini er formaður í løgtingsins Vinnunevnd, gjørdi nógv burtur úr føroysku luttøkuni í eini oljuvinnu og vísti til royndirnar norðmenn hava gjørt sær á hesum øki,. Hann helt tað vera rætt at hava føroyska keikantin við men legði samtíðis dent á, at tað má vera upp til landsstýrismannin at meta um, nær tað kunnu gevast undantøk. Nøkur undantøk eru latin og helt tingmaðurin, at tað var í lagi. -Tað er órímuligt at seta krøv til, at man t.d. stýrir ein boripall inn í eina føroyska havn til onkur smáttaríir, um hann kemur onkra aðrastaðni frá og skal til at bora við Føroyar. Tað er eisini órímuligt, um ein sera stórur og tungur og kostnaðarligur lutur liggur á einum stað og man krevur, at hann skal flytast til lands í Føroyum at venda og so útaftur á ein boripall. Tað haldi eg Oljufyrisitingin og teirra fólk hava klárað væl at gjørt í lagaligheit og rímuligheit.

Tingmaðurin vísti á, at onkur hevur nevnt loyviøkið í 1. útbjóðing fyri gullhornið, men tíverri er gullið ikki komið enn, men kanska, man má hava loyvi at vóna hehetta segði hann og helt fram:

– Nú er so ætlanin at fara longur inn á føroyska økið. Vit hava fingið at vita, at basaltið er tjúkt her, og at tað er ringt at síggja og bora gjøgnum basaltið. Nú verður so bjóðað út longri inni á grunninum, og so er møguleiki fyri, at man kemur í nánd av fiskileiðum, men har skilji eg, at man við lagaligheit fær funnið fram til, at ongar ella minst møguligar konfliktir kunnu taka seg upp.

Hendrik Old vísiti á, at Javnaðarflokkurin hevur frá fyrstan tíð verið fyri at fara undir leiting og soleiðis, at føroyskar fyritøkur fáa møguleikar at vera við. – Sum heild má sigast, at oljuumsitingin seinastu árini hevur gjørt eitt gott arbeiði og greitt frá hesum, so tað hevur verið lutvíst lætt at fáa innlit í hjá amatørum, sum flestu okkara eru. Eg vóni, at tað vera meiri inntøkur av hesum virksemi, sum verður bjóðað út. Nú verður farið víðari um og okkara vón er, at tað gevur eitt gott úrslit. Men kemur einki annað burtur úr, tá er so tað hent, at føroyskar fyritøkur eru blivnar meira kappingarførar og hava lagt seg eftir at vera framvið, har møguleikar eru. Tað má sigast um føroyska vinnu sum heild, at sær man møguleika at vinna nakað, so eru føroyskar fyritøkur úti um seg. Sjálvt um vit onga olju hava funnið, so hevur tað verið ein stórur framburður fyri føroyska vinnu, og tað vóni eg at tað framhaldandi verður.



*Tingmenn halda, at tað hevur stóran týdning, at føroysk vinna verður við í oljumenningini sum her hjá Atlantic Supply Base í Runavík*



Poul Michelsen, tingmaður:

# Marknaður keyparans er galdandi innan føroysku oljuvinnuna

**– Áhugin fyri leiting við Føroyar er minni enn áður, og vit kunnu tí tosa um, at í dag er tað marknaðurin hjá keyparanum (»Købers marked«), har oljufeløgini, í størri mun enn áður, kunnu seta treytirnar segði Poul Michelsen, framsøgumaður Fólkafloksins m.a. í løgtinginum herfyri, tá uppskotið um løgtingslóg um annað útbjóðingarumfar til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum var til 1. viðgerð**



*Poul Michelsen, tingmaður: -Vit mugu ikki vera ólagalir men eitt má ikki broytast og tað er, at allar vørur og tænastur í sambandi við leiting mugu tollast í Føroyum*

2. ÚTBJÓÐING
*Jan Müller*

Tingmaðurin vísti á, at kanningarnar við Føroyar hava ikki givið tað úrslit øll vónaðu. Tí er føroyska økið ikki eins áhugavert sum seinast. Hesi viðurskifti gera tí, at tað í dag heldur eru oljufeløgini enn vit, ið kunnu seta treytir.

Poul Michelsen vísti á, at økið, sum skal bjóðast til oljuleiting, er størri enn seinast, men nógv vitan er ikki um økið. – Váðin við Føroyar er vaksin síðani seinastu royndarboringar, – og minkaður aðrastaðni. Í viðmerkingunum til uppskotið stendur m.a., at »Tað kann ikki útihýsast, at tað eru kollvetnisgoymslur í Føroyum«, so støðan er nógv broytt, og tí eru útbjóðingartreytirnar eisini nakað øðrvísi enn seinast segði tingmaðurin og helt fram:

– Við fyriliggjandi uppskoti fær landsstýrismaðurin í oljumálum heimild at geva fyribilsloyvi í 3 ár. Landsstýrismaðurin fær somuleiðis møguleika at stramma upp uppá krøvini til oljufeløgini, alt eftir hvussu støðan er og hvussu áhugin er hjá oljufeløgunum.

Í sáttmálatreytunum stendur, at føroyskar skulu verða við. Eitt slíkt lógarkrav hevur givið føroyskum fyritøkum møguleika at royna seg á hesum øki. Men tær fyritøkur, sum hava klárað seg og hildið fram í einum samstarvi við oljufeløgini, hava megnað tað vegna dugnaskap teirra og ikki tí, at lógin krevur tað.

Poul Michelsen helt fyri, at tað er eitt gott arbeiði, sum fyriliggur til tingið at taka støðu út frá. Tað er lætt lesiligt. Og tað er sjáldan, at tá tað er á so tekniskum slag, at tað er so lætt at skilja. Hann helt annars fyri, at vit mugu ikki steðga á nú. Vit mugu halda áfram hóast alt ikki gekst so væl í 1. rundu.

– Tað er ikki nógv vitan um nýggju økini boðin verða út. Nú verður so eisini øðrvísi við skipanini, har tað hereftir ber til at samráðst við landsstýrismannin. Tað kann gott koma hartil, at tú ikki fær oljufeløgini til at binda seg til at gera stórvegis íløgur annað enn til kanningar. Men alt eftir hvussu nógv oljufeløgini bjóða hevur landssstýrismaðurin møguleika at samráða seg til eitt betri úrslit. Landsstýrismaðurin kann geva fyribilsloyvi sum oljufeløgini kunnu umsita í nøkur ár, og tá 3 ár eru farin kunnu tey gera niðurstøðu og tá kann felagið samráða seg til ein nýggjan sattmála við møguligum boringum fyri eygað ella kastd økið aftur, og tað merkir í veruleikanum, at at vit eru eini »købers marked« støðu.

### Ómak

Poul Michelsen helt, at man hevur gjørt sær ómak at lúka treytirnar í grein 7, har tað verður sagt, hvussu man skal fara fram, varisliga og við skynsemi, við atliti til fiskikap og umhvørvi og har almenn áhugamál og hvat samfelagið kann fáa burtur úr eisini skal havast í huga.

Tingmaðurin segði seg vera sannførdan um, at stóð tað ikki í lóggávuni, at føroysk virki skulu hava møguleika at vera við í oljuvinnuni, so vóru tað fleiri feløg, sum ikki vóru komin við, tí føroysk virki høvdu ikki førleikan. Tað hevði verið so nógv meira náttúrligt fyri oljufeløgini bara at funnið sær samstarvsfelagar aðrastaðni. - Eg eri sannførdur um, at stóð tað ikki í lógini, at tað skal vera um føroyskan kaikant, so kom Atlantsflog ongantíð upp í part, og so hevði flogfelagið heldur ikki havt tann førleikan teir hava í dag, nú teir arbeiða á norskum øki.

Poul Michelsen helt eisini, at tað hava verið føroyskar fyriutøkur, sum hava yvirspælt kravið um føroyskan kaikant og brúkt meira tíð at trútta kravið í lógini enn at søkja eitt positivt og konstruktivt samstarv.

-Tað liggur so eisini í tekstinum, at man møguliga eigur at broyta hesar reglur, og tað haldi eg eisini man eigur at umhugsa. Men eitt eigur man ikki at broyta og tað er tolling inn og úr landinum..Alt, sum kemur á boristaðið, og allur fólkaflutningur eigur at ganga gjøgnum føroyskar tollmyndugleikar. Men at skula flyta eina stóra maskinu til Runavík fyri síðani at flyta hana útaftur er ikki serliga positivt í einum samstarvi. Tú kanst líka so væl flyta hana beinleiðis bara tú syrgir fyri at tolla hana.

Poul Michelsen ivaðist annars ikki í, at er tað náttúrligt, so vilja útlendsk feløg eisini brúka føroyska arbeiðsmegi, sum er dugnalig í sær sjálvum. Hann fegnaðist um, at allir loyvishavararnir hava havt skrivstovur í Føroyum og verið við til at menna bæðiSyndri ætlan og at føroyingar hava fingið pengar til nógvar verkætlanir.

# Mugu frøðast um áhugan

2. ÚTBJÓÐING
*Jan Müller*



*Kári Højgaard, tingmaður helt fyri, at vit eiga at frøðast um, at áhugi er fyri Føroyaøkinum, nú so mong onnur øki eru meira attraktiv*

Kári Højgaard úr Sjálvstýrisflokkinum helt oljuvinnuna hava havt positiva ávirkan og vísti á, at undan 1. útbjóðing snúði orðaskifti seg um, at ein oljuvinna fór at avlaga føroyska samfelagið, og vit fóru at missa tamarhaldið á tí, fiskivinnan fór at verða afturútsigld, nýggja vinnan fór at vera kappingaravlagandi osfr. Hetta hevur tó ikki verið so og tað er at gleðast um helt tingmaðurin fyri.

– Fýra boringar eru gjørdar. Kolvetni er staðfest. Tað er gleðiligt, at tað eru oljufeløg, sum hava áhuga at halda fram her. Tá man skal gjalda kanska sjey ferðir so nógv fyri at fáa oljuna upp í Norðuratlantshavi sum í Arabisku Emeradunum, so er sjálvsagt, at onkur metir væl um støðuna, áðrenn borað verður, og kanningarnar verða gjørdar so nágreiniliga sum gjørligt. At áhugi kortini enn er fyri økinum skulu vit frøðast um.

Kári Højgaard metti tað vera sera óheppið, um virksemið steðgar og vísti til, at man hevði 8 boringar tilrættalagdar fyri eitt ávíst tíðarskeið, og út frá tí blivu tilboðini givin. Tá so av góðum grundum loyvi verður givið til eina seinking og steðgur kemur í, so er vandi fyri, at ekspertisan hvørvur. – Vit høvdu eitt felag, sum beyð seg fram og tá steðgur kemur í, bara ein boring í tvey ár, tá kanst tú ikki behalda fólkið og bara bíða, til tað einaferð byrjar aftur. Tað er sera óheppið, at stígur kemur í, men eg vóni ikki, at man ikki hevur mist royndirnar. Við hesum sipaði hann til alt tað, sum er lagt í at byggja upp útgerðarhavnina í Runavík.

Kári Højgaard helt tó sjálvur, at føroyingar í síni servisering hava klárað seg væl og hava verið góðir samstarvspartnarar. Hann metti tað vera sera týdningarmikið, at føroyingar kunnu vinna sær førleika, soleiðis at vit kunnu kappast á jøvnum føti. Hann spurdi í hesum sambandi, hví man ikki kann hava nógv fóðringsrør liggjandi í Føroyum, soleiðis, at vit eisini á jøvnum føti kunnu kappast um serviseringina beint hinumegin markið, tí vit liggja nógva tímar nærri feltunum enn t.d. Aberdeen í Skotlandi. Sum er so eru føroyskar fyritøkur ov veikar til at hava liggjandi nógv á goymslu.

Annars helt tað vera rætt, at alt tilfar og útbúnaður til oljuboringar verður flutt um føroyskan kaikant, so vit vita, hvat tað er, sum fer út á pallarnar, ið bora. Í tí sambandi spurdi Poul Michelsen, tingmaður, hvar slammið frá boringunum endar. Hann helt, at tað skuldi inn til lands, men visti einki um, at nakað slikt var komið í land í Føroyum.

Kári Højgaard helt annars fyri, at tað er sera týðandi, at vit fáa staðfest, hvussu møguligur oljupeningur skal brúkast. Tað er ikki bara sum at vinna í happadráttinum. Vit vita, at her er kolvetni, og tað hevur verið gitt, at tað møguliga kann vinnast í rakstrarverdum nøgdum. Men tað kemur at seta stór krøv til politikararnar, soleiðis at peningurin ikki avlagar samfelagið.

Framsøgumaðurin hjá Sjálvstýrisflokkinum var sera nøgdur við arbeiðið sum oljumyndugleikarnir hava gjørt. – Tað hevur verið fyrimyndarligt, og eg vóni fyri tað føroyska samfelagið, at vit fara at finna olju, og at vit duga at umsita tað, sum oljan fer at geva, skynsamiliga.

## Annika og Annita

Lesið í mikudagsblaðnum, hvat tær báðar tingkvinnurnar Annita á Fríðriksmørk og Annika Olsen høvdu uppá hjartað undir 2. viðgerð av 2. útbjóðing.